# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:



Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


## Skjóta við sama lag í Sundalagnum

Í ár eru liðin 25 ár síðani Sunda Byrsufelag sá dagsins ljós. Hetta ætlar tey í felagnum ikki at lata fara aftur við borðinum uttan markering. Í hesum sambandi verður skjótibreytin hjá felagnum opin fyri almenninginum leygardagin 16. apríl, tá øll eru vælkomin at royna seg við nøkrum skotum. Til ber at lána byrsu og patrónir. Felagið bjóðar ein drekkamunn og annað gott, so tað skuldi ligið væl fyri at lært ítróttina at kenna henda dagin. Sunda Byrsufelag hevur í roynd og veru longu fingið eina føðingardagsgávu, um ein kann siga tað so. Á býráðsfundi í Sunda kommunu mánakvøldið varð samtykt, at lata felagnum 6.000 krónum í stuðli til tiltøk í sambandi við 25 ára degnum.

# Øll útiliðini vunnu

**KVINNUFÓTBÓLTUR**

### Eingi óvæntað úrslit var í gjár, tá landskappingin hjá kvinnunum varð bríkslað í gongd

Hilmar Jan Hansen




*Tað blivu sigrar til trý tey fremstu í fjør, tá kvinnufótbólturin fór í gongd í gjár, og millum annað vunnu meistararnir úr KÍ á uppflytarunum úr B36*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fyrsta umfar í landskappingini hjá kvinnum var í gjár, og gjørdist talan um tríggjar útisigrar. Tann fyrsti dysturin var í Gundadali tíðliga seinnapartin millum uppflytararnar úr B36 og greipuvinnararnar úr KÍ. Tað endaði við, at KÍ vann dystin 3-0.

Longu í sjeynda minutti brendi Rannvá Andreasen brotsspark, men hon gjørdi tað gott aftur, tá hon í seinna hálvleiki skoraði til bæði 2-0 og 3-0 – fyrst við einum langskoti og síðani einum skallara. Málið, sum legði KÍ á odda stutt undan steðginum, fekk Malena Josephsen eftir hornaspark.

### Gjørdi skjótt av

AB, sum í fjør vann silvur, gjørdi skjótt av og legði botnin undir útisigurin á Víkingi í fyrra hálvleiki, tí tá dysturin í Gøtu var komin í helvt, var longu 3-0 til AB. Hellen Haraldsen, Doris í Garði Joensen og Olga Kristina Hansen syrgdu fyri málunum.

Eftir steðgin var dysturin munandi javnari, og Anna H. Joensen skoraði fyri Víking næstan beinanvegin. Men ímóti endanum fekk AB tvey mál innan fyri fimm minuttir til 5-1, sum Mona Breckmann og Lisa í Liða skutu, áðrenn Jóhanna B. Fuglø í yvirtíðini gav Víkingi eitt troystarmál, so dysturin endaði 5-2 til AB.

### HB kløkkaði Skála

Hóast ikki færri enn fýra av spælarunum hjá Skála høvdu spælt hondbóltsdystir bæði leygardagin og fyrr um dagin í gjár, megnaðu bronsuvinnararnir av Skála at vinna 1-0 á uppflytarunum úr HB. Tað var tó um reppið, at vertirnir komu á odda við brotssparki eitt korter inn í dystin, men Helen á Lakjuni, sum í summar hevur skift flogbóltin út við ein málmanskjans í fótbólti, tók brotssparkið hjá Mariannu H. Jacobsen.

Bara fýra minuttir seinni kom hinvegin mál í hinum endanum, sum Bára Berthelsen skoraði, so Skála legði seg á odda 1-0. Í fyrra hálvleiki vóru bæði liðini væl við, men í undanvindinum eftir steðgin royndist Skála betri og helt væl og virðiliga fast um leiðsluna, til líðugt var.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

Vit fara ikki at vassa ov nógv í hesum tapinum. Finnur Justinussen og Kaj Leo í Bartalsstovu gjørdu tað ljóta ímóti okkum ímóti dystarenda. Serliga seinna málið kennist eitt sindur irriterandi júst tí vit royndu at trýsta fyri útjavnandi málinum.

*www.hb.fo*

B36 yvirtók nú aftur initiativið, men fílast kundi kanska á, at nógva bólttamarhaldið úrslitaði í ov fáum málmøguleikum. Tann størsti í fyrra hálvleiki var, tá Heini í Skorini sendi eitt frálíkt langskot móti málinum, men René Tórgarð bjargaði í stórum stíli.

*www.b36.fo*

Í stuttum kann sigast, at hetta var ein tann vánaligasti dysturin í ár. Hvørki av liðunum megnaði nakrantíð at fáa nakað sum líktist hondbóltsspæli. Tað sást beinanvegin at heimaliðið ætlaði at leggja nógv fyri, fyri at tryggja sær at plássið í finaluni skuldi verða staðfest í dag. Hetta kom av eini ella aðrari orsøk sum ein kvøkkur fyri H71 liðið, og merkti liðið tað mesta av dystinum. Stutt sagt alt gekk av skriðuni, snøgt sagt onki riggaði.

*www.h71.fo*

Tað mest umráðandi var, at KÍ kom víðari. Burtursæð frá tí var ikki nógv posetivt at taka við frá hesum dystinum. Miðverjan gjørdi tað gott, men hon bleiv aldrin sett undir trýst.

*www.nordlysid.fo*

Bæði neistakvinnur og neistamenn í FM-finalunum. Ófført og til lukku. Góð 80 ára føðingardagsgáva at fáa.

*www.neistin.fo*